gult16 cyan16 magenta16 svart16



## Oddagrein

Prix Føroyar er ikki longur bara ein tónleikakapping sum annaðhvørt ár gevur føroyskum tónleikabólkum møguleika at framføra fyri áhoyrarum og dómarum, sum hareftir velja tann besta bruturúr. Tað er blivið so nógv meira enn tað.

Prix Føroyar er við árunum blivið einki minni enn sjálvt tyngdarpunktið fyri føroyskan popp- og rocktónleik við teimum fyrimunum og vansum, sum hetta inniber.

Føroyska rock- og popptónleikalívið blómar í tíðini undan og kring Prix Føroyum, og hevur tað enntá eisini við at sovna eitt sindur í tíðini millum kappingarnar.

Prix finalan er tað eina kvøldið, sum upprennur annaðhvørt ár, har átta av teimum frægastu tónleikabólkunum í landinum fáa høvi at vísa seg frá síni bestu síðu aftaná drúgvar fyrireikingar.

At hetta fer fram undir umstøðum, sum nærum mugu kallast optimalar, í konserthøllini í Norðurlandahúsinum, setir ein hátíðarligan dám á konsertina og ger sítt til, at Prix finalan er eitt av størstu tiltøkunum yvirhøvur her á landi. Av tí sama er tað er ongantíð ein spurningur um, men bara hvussu skjótt, atgongumerkini til finaluna verða útseld.

Á sama hátt er Prix finalan karmur um eina fjølmiðlahending í størsta mátistokki, har teir báðir almennu loftmiðlarnir rættiliga spíla seg út og brúka nógva orku uppá at varpa tiltakið út í hvørja stovu í landinum.

Tey positivu árinini, sum Prix Føroyar hevur skapt, eru løtt at fáa eyga á. Bara tað at 38 føroyskir bólkar í ár vóru førir fyri at stilla seg á pallin og framføra egin løg er eitt beinleiðis árin av Prix Føroyum - eitt positivt árin væl at merkja.

Vansarnir við tiltakinum hómast eisini, millum annað í líki av at tónleikalívið hevur tað við at sovna í so djúpt í tíðini í millum Prix kappingarnar, men vigað upp ímóti hvørjum ørðum, er eingin ivi um, at Prix Føroyar fyrst og fremst er mennandi fyri føroyska tónleikalívið.

Tá Prix Føroyar eftirhondini er blivið so umfatandi og umráðandi, er tað ikki annað enn nátúrligt, at Sosialurin undan finaluni leygarkvøldið hevur valt at gera eitt serblað, sum burturav snýr seg um Prix Føroyar. Á hesum 8 síðum hava vit valt at hyggja nærri at sjálvum tiltakinum og at teimum átta bólkunum, sum seinastu mánaðirnar hava fyrireikað hvørja minstu detalju undan konsertini í Norðurlandahúsinum leygarkvøldið, tá teir skulu standa sína roynd í framførsluni og kappast um vinningarnar.

Góðan lestrarhug!

Sosialurin
Lagt til rættis:
Rúnar Reistrup runar@sosialurin.fo
Útgevari/uppseting:
Sp/f Sosialurin post@sosialurin.fo
Prent: Prentmiðstøðin

# Prix Føroyar Finalan 2001

**Maðurin, sum hevur samskipað og leitt Prix Føroyar tiltakið síðan tað byrjaði sum ein einstøk roynd í 1995, Fróði Vestergaard, sigur her frá um tað nógva arbeiði, sum fer fram handan Prix-leikpallin, og um hvat er í væntu á finaluni.**

*Skrivað hevur: Fróði Vestergaard/projektleiðari*

Enn einaferð avgjørdu stjórin í Norðurlandahúsinum saman við stýrinum fyri Norðurlandahúsið, at fara í holt við eina nýggja tónleikakapping. Bæði Útvarp Føroya, Sjónvarp Føroya og Føroya Undirhalds Tónleikarafelag tóku undir við uppskotinum um samstarv um enn eina Prix Føroyar kapping.

### Vinningarnir

Prix Føroyar nøktar øll krøv, sum eru sett fyri Norðurlandahúsið. Húsið vil stuðla mentan í Føroyum, gera tiltøk uttanfyri miðstaðarøkið, umboða føroyska mentan uttanlands og fáa norðurlendska mentan til Føroya.

Um vit líta aftur um bak, so kunnu vit ásanna, at Prix Føroyar tiltakið sum heild er vaksið nógv síðani vit byrjaðu í 1995. Sum dømi kann nevnast, at meðan vit í 1995 høvdu bert ein vinning so eru í 2001 meira enn 3 stórir og lokkandi vinningar. Allir finalistarnir vera við á komandi konsertfløguni, sum Útvarp Føroya gevur út beint aftaná finaluna. Mentamálastýrið letur høvuðsvinningin, sum er ein vika við upptøku í Studio 1 í "Lundgaard Studio". Hartil verður møguleiki, saman við Atlantic Airways, at sleppa á Jelling Festival í mai og á Nibe-Festival síðst í juni. Innbjóðing er komin frá Ólavsvík í Íslandi um, at fáa ein Prix Føroyar Finalist til føroysku dagarnar í Íslandi.

### Útlendskur áhugi

Til finaluna koma útlendskir plátuútgevarar, tíðindafólk, festivalfyrireikarar og tónleikafeløg uttanlands. Prix Føroyar finalan røkkur út í hvønn krók í Føroyum, men eisini er møguleiki fyri at gera seg galdandi uttanlands. Egill Ólafsson úr Íslandi, sum er kendur tónleikari og sjónleikari, kemur til Føroya at halda fyrilestur, um hvussu ein "traðkar fram á palli". Hartil fer Egill Ólafsson at fylgja ljóðroyndunum og geva bólkunum góð ráð viðvíkjandi pallframførslu.

### Framkomin teknikkur

Stórur dentur verður lagdur á at bróta upp úr nýggjum, bæði tá ið tað snýr seg um ljóð- og ljósútgerð. Egil B. Hansen, er settur sum ljósdesignari til finaluna. Sjónvarp Føroya og Útvarp Føroya hava sett Herluf Sørensen til at produsera sjálva Prix finaluna. Royndur verður ein stórur og dýrur digitalur ljóðpultur og nýggj serlig ljósútgerð er leigað til finaluna. Claus Pedersen, ið er ein kendur ljóðteknikari, skal ljóðblanda í Norðurlandahúsinum til finaluna. Útvarp Føroya hevur fingið nýggja digitala útgerð, og kunnu sjálvir gera konsertfløguna lidna.

Prix Føroyar veksur og verður meira proffessionelt fyri hvørja ferð. Tað er gott og soleiðis eigur tað at verða, men hetta letur seg einans gera við einum góðum samstarvi og positivum vilja frá føroyskum myndugleikum og vinnulívi.

### Prix í luftini

Okkara føroyska flogfelag Atlantic Airways hevur átikið sær at verða høvuðssponsor og hevur tí fleiri uppgávur fyri Prix Føroyar kappingina. Felagið flýgur føroyskar luttakarar búsitandi uttanlands til Føroya fyri serprís, festivalvinnararnir verða fluttir ókeypis til Danmarkar og útgerð verður flogin ókeypis til finaluna. Fjølmiðlafólk o.o., sum koma til finaluna, koma við Atlantic Airways og soleiðis kundu vit hildið áfram. Vit eru sera takksom fyri samstarvið við Atlantic Airways, tí valla høvdu tað verið so nógvir vinningar uttan henda stóra sponsor. Eisini aðrir smærri sponsorar hava gjørt sítt til at gera Prix Føroyar betri. Nevnast kunnu prixblusurnar sum LÍV hevur givið, gistingin á Hotel Føroyum og Handilskjarnin sum letur búnan til frásøgumannin. Faroe Express hevur játtað at hjálpa við flutningi har í á stendur.

### Fólksligt grundarlag

Prix Føroyar skal vaksa, tó uttan at missa tað fólksliga grundarlagi og jørðforbindilsi. Arbeiðið, sum tónleikarar gera í venjingarhølunum, má ikki undirmetast, tí uttan hetta arbeiði var einki Prix Føroyar og eingin finala. Kring landið eru fólk, sum átaka sær uppgávur til innleiðandi umførini, t.d. at byggja pallar, gera mat, verða duravørðar o.s.fr.. Dómararnir átaka sær at døma og ilt er at gera allar bólkar nøgdar, men hetta er eitt arbeiði, sum má gerast, sjálvt um tað ikki altíð er so takksamt.

Fyrireikararnir vilja at enda takka øllum teimum, sum hava luttikið og hava hjálpt til og stuðlað Prix Føroyar 2001. Vit gleða okkum til eina góða og spennandi finalu leygarkvøldið 21.apríl kl.20.00.



Atlantic Airways
Handilskjarnin
FØROYA LANDSSTÝRI

## Fólk, ið á hvør sín hátt eru við í arbeiðinum handan Prix Føroyar 2001.

| | |
|---|---|
| Helga Hjörvar: | Stjóri í Norðurlandahúsinum |
| Jógvan Jespersen | Stjóri fyri Útvarp Føroya og Sjónvarp Føroya |
| Ove Olsen | Deildarleiðari í Útvarpi Føroya |
| Hans A. Johannesen | Deildarleiðari í Útvarpi Føroya |
| Ivan Niclasen | Deildarleiðari í Sjónvarpi Føroya |
| Fróði Vestergaard | Projektleiðari fyri Norðurlandahúsið |
| Herluf Sørensen | Framleiðari fyri Útvarp Føroya og Sjónvarp Føroya |
| Egil B. Hansen | Ljósdesignari |
| Zacharias Guttesen | Ljóstekniskur leiðari í Norðurlandahúsinum |
| Gardar Hall | Ljósteknikari fyri Norðurlandahúsið |
| Óla Jákup í Dímun | Ljóðtekniskur leiðari í Norðurlandahúsinum |
| Claus Pedersen | Ljóðteknikari fyri Norður-landahúsið |
| Jan Petursson | Ljóðteknikari fyri Norðurlandahúsið |
| Heri av Reyni | Pallsmíð |
| Jens Jákup Hansen | Pallsmíð |
| Johan Mouritsen | Gittarteknikari |
| Jákup Magnussen | Frásøgumaður á pallinum |
| Arina Bischoff | Frásøgukvinna á pallinum |
| Kaj Johannesen | Formaður í FUT |
| Magnus Pauli Poulsen | Nevndarlimur í FUT |
| Tórbjørn Lisberg | Nevndarlimur í FUT |
| Tróndur Vatnhamar | SVF |
| Tórunn Ellingsgaard | SVF-Vertur |
| Finnur Hansen | Ljóðteknikari fyri ÚF framleiðari |
| Edvard N. Debess | Tónleikaraframleiðari |
| Hjalmar Hvítklett | Teknikari fyri ÚF |
| Jónsvein Heinesen | Teknikari fyri ÚF |
| Pauli Magnussen | Teknikari fyri ÚF |
| Annlis Bjarkhamar | Vertur fyri ÚF |
| Hans Petur Hansen | Fotografur fyri SVF |
| Bjarni Rubeksen | Fotografur fyri SVF |
| Jógvan Eli Dam | Fotografur fyri SVF |
| Bjørg M. Anderssen | Fotografur fyri SVF |
| Hallur Thomsen | Fotografur fyri SVF |
| Mikkjal Øster | Fotografur fyri SVF |
| Ragnar C. Joensen | Fotografur fyri SVF |
| Jóhannes Danielsen | Fotografur fyri SVF |
| Kartin M. Arnskov | Klippari fyri SVF |
| Bjarnheðin í Hoyvík | Klippari fyri SVF |
| Ragnar A. Jacobsen | Klippari fyri SVF |
| Edvard S. Joensen | Samskipari fyri teknikki í SVF |
| Regin Patursson | Scenografur |
| Ginna Midjord | Útvarp Føroya |

Umframt hesi eru fleiri onnur hjálparfólk sum ikki eru nevnd

gult17 cyan17 magenta17 svart17



# Tangz: – Vit eru altso ein rockbólkur

**Eftir at hava verið eitt sindur stíl- og sjangruforvirraðir hava Tangz nú funnið sín bás sum rockbólkur. Og nú sveittin eftir eitt spennandi undanumfar í Miðvági er turkaður av, eru teir fimm tónleikararnir klárir til eina finalu, sum teir hesuferð síggja ein møguleika fyri at vinna. Vit hava hitt sangaran í bólkinum, Rók Jacobsen.**



*Rúnar Reistrup*

Framførslan í Prix undankappingi í Klaksvík fyri tveimum árum síðan gjørdist eitt satt gjøgnumbrot hjá Tangz. Mestsum eftir einum degi menti Tangz seg frá at vera húsaorkestur í Studentaskúlanum Í Hoydølum til at vera ein landskendur bólkur, sum av nógvum varð mettur sum eitt gott boð sum vinnari av Prix finaluni í 1999.

Soleiðis bleiv tað tó ikki, men nú eru teir fimm havnardreingirnir vendir aftur í við einum meira poleraðum og stílreinum Tangz, sum ikki kann renna undan teimum vónum, sum verða settar til bólkin.

*Hvat kalla tit sjálvir tónleikin, sum tit spæla?*

– Vit eru settir í allar møguligar løgnar básar. Onkur hevur heft upp á okkum, at vit eru ein samanrenning av jazz, rock og funk, og annað líknandi tvætl hava vit hoyrt mestsum hvørja ferð onkur roynir at seta okkum í bás. Vit vilja gjarna sleppa undan øllum hasum løgnu kategoriseringunum. Vit eru bara ein vanligur rockbólkur sum einhvør annar bólkur, ið spælir rock.

Fyrstu ferð at nakað hoyrdist til Tangz var á Prix Føroyar undankappingin í Klaksvík fyri tveimum árum síðan. Men hóast tað kundi sæð soleiðis út, so leggur bólkurin dent á, at hann ikki varð stovnaður til Prix.

– Vit byrjaðu á studentaskúlanum í Hoydølum og spældu okkara fyrstu konsertir har áðrenn Prixið í 1999 bleiv aktuelt. Men Prix Føroyar setti ferð á og fekk okkum at skriva okkara egnu løg, so á tann hátt var tað við til at fáa gongd á Tangz. Men vit vóru til áðrenn Prix.

*Hvør munur er á Tangz anno 2001 og Tangz, sum var á finaluni seinast?*

– Í byrjanini var eitt sindur av vavstri í okkara stíli. Tað haldi eg at vit kunnu viðganga. Nú hava vit í størri mun funnið ein reyðan tráð ígjøgnum tað, sum vit skriva, og eg trúgvi at vit eru meira stílreinir enn vit vóru á seinastu finaluni.

*Nógv mettu tykkum sum favorittar til at vinna síðstu Prix finaluna. Hvat hildu tit sjálvir?*

– Tað vigaði ikki so tungt á okkum. Vit vóru akkurát stovnaðir og vit vistu at Taxi vóru alt ov góðir til at vit ella nakar annar kundi koma upp á tal. Í finaluni hesaferð er eingin so klárur favorittur sum Taxi vóru, og tað er nokkso stuttligt.

*Vóru tit vísir í at koma víðari til finaluna hesaferð?*

– Vit vónaðu sjálvsagt at koma víðari og væntaðu tað helst eisini innast inni. Men kappingin í Miðvági var sera hørð og tveir ella tríggir av bólkunum høvdu eftir mínum tykki havt góðan møguleika at kvalifisera seg til finaluna, um teir høvdu spælt á onkrari av hinum undankappingunum. Tað vistu vit frammanundan, og tí vóru vit sera nervøsir og hugsaðu nógv um »hvat nú um vit ikki koma víðari? Hvussu langt fella vit, um vit um tað hendir?« Men tað gekk tíbetur.

*Hørjar vónir hava tit sjálvir til Tangz?*

– Vit eru uppsettir uppá at fara á pallin at gera tað gott. Eg haldi ikki at vit hugsa so nógv longri enn tað. Sjálvandi vilja vit akkurát líka gjarna vinna sum allir hinir bólkarnir, men vit fara at royna at gloyma dómararnar og ístaðin hugsa um, at vit gera eitt stórt show á einum stórum palli við perfektum ljóði og útseldum Norðurlandahúsi. Tað er tað mest umráðandi fyri okkum, hóast tað sjálvsagt hevði verið stuttligt um vit vunnu ella sluppu til onkran festival.

*Hvat fara tit at spæla á finaluni?*

– Vit hava tað luksusproblemið at vit hava rættiliga nógv løg. Og tað skiftir allatíðina hvat vit hava hug til at spæla og hvat situr best hjá okkum, so tað er ikki heilt greitt hvørji løg vit fara brúka á finaluni. Eg havi varhugan av at nógvir av finalubólkunum eru kanska bara førir fyri at spæla í ein hálvan tíma tí teir hava fýra-fimm løg og so er tann søgan liðug, so hjá teimum er ikki so ringt at velja løg út. Men tað vísir seg at tað av onkrari orsøk eisini ber til hjá teimum at koma við í Prix finaluna.

*Hvør er favorittur?*

– Tað er All That Rain eftir mínari meting. Eg ivist heldur ikki í at Týr kann gerast heilt spennandi fyri dómararnar.

*Hvat við Tangz?*

– Vit trúgva uppá, at alt kann henda.

*Er tað líka spennandi at vera við á finaluni aðru ferð?*

– Ja, tí hatta er tað størsta sum er innan føroyskan tónleik, og tað hevði ikki verið nøkur grund til at spælt rocktónleik, um man ikki royndi at sleppa við til Prix finaluna. Hatta er tann optimala konsertin her í landinum.



# Týr: Kvæðarockur úr betonbygdini



**Í einum venjingarhølum í føroysku betonbygdini - Oyrasundskollegienum - hoyrast javnan rocktónar við føroyskum kvæðarútmum. Tá er tað bólkurin Týr, sum hevur ljóðførini frammi, og tað hevur ikki verið so sjáldan, síðan bólkurin gjørdist nummar tvey í undankappingini í Vági. Vit hava hitt guitaristin Hera Joensen, sum saman við Kára Streymoy stovnaði bólkin fyri tveimum árum síðan.**

*Rúnar Reistrup*

*Hvør er søgan handan navnið Týr?*

– Tað er eit navn úr norrønu gudalæruni og tað hevur sjálvandi ein ávísan samanhang við tann tónleikin, sum vit spæla. Og so eitur ein pláta hjá Black Sabbath Týr, skrivað við rúnum, eins og vit skriva Týr. Tað er kanska helvt um helvt frá Black Sabbath og frá norrønu gudalæruni. Annars hevur tað ikki nakra djúpri meining.

*Hvussu ber tað til, at tit geva føroyskum kvæða- og táttasiðum so nógv rúm í tykkara heldur tunga tónleiki?*

– Kvæðir og fólkatónleikur hava altíð havt mín áhuga, men eg havi bara ongantíð gjørt nakað við tað fyrr enn nú. Mær hevur altíð dámt væl tónleik sum tann hjá Enekk, og mær dámar væl rock og heavy, og so bleiv tað tann blandingin.

*Hvørjar vóru vónirnar áðrenn undankappingina?*

– Vit vóru ikki vísir í, at vit fóru at koma víðari. Men vit fóru við fyri at royna at sleppa í finaluna, og vit høvdu ávísar vónir um tað. Eg haldi, at ein stór styrki hjá okkum er útsetingin av løgunum og so kanska løgini sjálv. Tey eru kanska ikki so øgiliga original, men tey eru so originalari enn nógv av tí, sum varð spælt í Vági tað kvøldið. Harafturat vóru rættiliga nógvir av bólkunum í kappingini ógvuliga óroyndir. Ikki tí, fleiri teirra høvdu framtíðarpotentiali, men tað í sær sjálvum er ikki nokk til at koma víðari. Vit eru málrættaðir og vita hvat vit vilja, og so eru vit rættiliga royndir tónleikarar. Tað hevur nokk gjørt munin.

Hóast bólkurin Týr ikki hevur verið at sæð í Prix høpi áður, so eru allir limirnir ikki grønir í kappingini.

Heri Joensen og bassleikarin Gunnar Thomsen eru kendir úr bólkinum Wolfgang, sum var við á fyrstu Prix finaluni í 1995 og sangarin Pól Arni Holm stóð við mikrofonini, tá Wild Child var í finaluni í 1997.

*Fara tit at vinna?*

– Okkara mál er at vinna. Um vit gera tað er so ein onnur søk. Tað kann sjálvandi væl vera, at tað ikki hendir. Men um man ikki siktar ov høgt, so rakar man ov lágt. Vit taka kappingina á álvara og venja rættiliga nógv undan finaluni.

*Hvørjum fara tit at leggja tykkum eftir á finaluni?*

– Tað einasta vit í veruleikanum hugsa um, er at spæla so væl sum gjørligt. Restina gera vit ikki so nógv við. Løgini vóru longu gjørd og útsett áðrenn vit komu í finaluna, og hvussu vit uppføra okkum á pallinum er bara nakað sum má koma, tá vit eru í støðuni.

